VIÐMERKINGAR

# Flogvøllur á Skorðhæddini

BILL JUSTINUSSEN
løgtingsmaður fyri Miðflokkin



Vit vóru mong, sum hvukku við í sambandi við orðaskiftið á Løgtingi mikudagin 26. apríl um framtíðar flogvallarviðurskiftini í Føroyum. Har upplýsti Bjarni Djurholm nevniliga, at Skorðhæddin í Neshaga í suðureysturoy ikki longur verður roknað sum eitt møguligt stað at byggja flogvøll á. Nú er Landsverk farið undir at kanna viðurskiftini í Søltuvík á Sandoynni og á Glyvursnesi í Suðurstreymi. Men Skorðhæddin er ikki longur ein møguleiki.

At landsstýrismaðurin og Landsverk so einvíst kunnu skera hendan møguleikan burtur, fara undirritaði og mong við mær als ikki at góðtaka. Sjálvandi eigur Skorðhæddin framvegis at roknast sum eitt alternativ í hesum spurningi, tí um nøkur fá ár kemur størsti fólkahópur í Føroyum at hava stytstu leið til júst Skorðhæddina. Tá tunnil millum Skálafjørðin og Havnina verður veruleiki, fara havnafólk bert at hava nakrar fáar minuttir til hendan møguliga flogvøll – enntá styttri enn út á Glyvursnes. Hetta merkir, at umleið 30.000 føroyingar fara at hava stutta leið til flogvøllin, og at stórur partur av føroyskum vinnulívi somuleiðis fer at hava stutta leið til hendan flogvøllin. Tá nú farið verður undir at bora undirsjóvartunnil millum Havnina og Skálafjørðin, er sera nærliggjandi at viðgera møguleikan fyri at nýta avlopsgrót til gerð av flogvølli, tí hetta er alt í sama øki. Skulu vit fyri eina ferð skuld tosa um at hugsa skilagott í føroyskum politikki, má hetta vera gylt høvi.

Tí fari eg staðiliga at heita á Bjarna Djurholm og Landsverk um alt fyri eitt at endurskoða skilaleysu avgerðina um at útihýsa suðureysturoy í hesum máli.

# Kommaseting

KRISTIN POULSEN
Fuglafirði



Kommasetingin í teimum føroysku bløðunum hevur verið stak vánalig tey seinastu árini, hóast nógv av teimum, sum skriva, eru sokallaðir akademikarar, sum skuldi væntað høvdu skil á kommaseting, men sjálvan barnalærdókin í kommaseting duga nógv av hesum ikki. Tað, sum meginparturin av einum 7. flokki fyri 30 árum síðani dugdi, duga hesi fólkin ikki.

Tað, sum eg ætlaði at koma við einum hjartasuffi um á hesum sinni, er kommaseting í samband við sernøvn.

Nógv, sum skriva, halda, at koma tey til eitt sernavn, so skal komma setast, men so er minni enn so altíð, og skal eg taka nøkur dømi.

Vaktarskipið Tjaldrið sleipaði trolaran Steintór inn á Havnina.

Ofta síggja vit, at komma verða sett um Tjaldrið og Steintór, men í hesum førunum skal einki kommast setast. Vaktarskipið Tjaldrið og trolarin Steintór hoyora tætt saman og skulu tí ikki skiljast sundur av komma, tí tað verður lagdur dentur á, at tað er vaktarskipið Tjaldrið og trolarin Steintór, talan er um. Høvdu vit havt skrivað: Vaktarskipið, Tjaldrið, sleipaði…, so lá í tí, at tað var bara eitt vaktarskip, og tað æt Tjaldrið, men tað var jú ikki meiningin.

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, er suðuroyingur.

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, gekk ígjøgnum Norðoyatunnilin í gjár.

Her skulu vit seta komma um Jóannes Eidesgaard og Steinbjørn Jacobsen, tí tað er bert ein løgmaður og bert ein borgarstjóri í Klaksvík, og so fáa vit at vita, sum í einum innskoti, at annar er løgmaður, og hin hevur verrið við til eitt tiltak, og tí skulu vit hava komma har.

Vónandi fara viðkomandi persónar at lesa hatta og taka tað til eftirtektar, tí hetta er skrivað í góðari meining.

# Eitt lítið vet um skynsama orku og Eiðisvatn

LEIVUR HANSEN
SEV-stýrisformaður



**Viðmerkingar til grein við sama navni, sum Hanus Vang herfyri hevði í bløðunum.**

Fyrst er at siga, at Hanus Vang nevnir ymisk viðurskifti í sambandi við varandi orkukeldur og SEV. Men tá onki nýtt kemur fram, sum ikki hevur verið viðgjørt fyrr, má greinin fatast sum ein røð av atfinningum móti SEV heldur enn eitt vælmeint íkast til kjakið um varandi orku og umhvørvi.

Fyrsti partur av greinini snýr seg um Eiðisverkið.

Her verður gamla stríðið frá áttatiárunum um høgtliggjandi útbygging sum alternativ til Eiðisverkið tikið framaftur. Tá var talan um eitt meira politiskt stríð, sum vardi í áravís, og sum fekk nógva almenna umrøðu, bæði í fjølmiðlunum og á løgtingi.

Tað skal tí ikki gerast meira burturúr tí her, annað enn at staðfesta, at stríðið førdi til drúgvar og kostnaðarmiklar kanningar. Niðurstøðan var, at skilabesta loysnin, bæði tekniskt og búskaparliga, var at fremja ætlanina hjá SEV.

Viðvíkjandi spurninginum um at brúka vetni, framleitt við vindorku, er at siga, at gransking og royndir við vetni fara fram ymsastaðni, og verður nógvur peningur brúktur til hetta.

SEV fylgir við hesum arbeiði, og luttekur SEV í einum samstarvi við lond í norðurhøvum í felagsskapinum "NAHA", t.v.s. North Atlantic Hydrogen Association.

Streymorka verður eisini nevnd.

Fyri einum fimtan árum síðani gjørdi ein arbeiðsbólkur undir Orkuráðnum, har SEV eisini luttók, kanningar av streymorkumøguleikum í Vestmannasundi. Út frá táverandi uppskoti til tøkni var niðurstøðan, at ætlanin var ikki skilagóð búskaparliga og tekniskt.

Tøknibúnaðurin á hesum øki er ein annar í dag, og hevur tað sjálvsagt áhuga hjá SEV at fylgja við í tí, sum hendir á hesum øki.

Viðvíkjandi bíligari streymi til hitapumpur er at siga, at tað eru nógvar vinnugreinar, ið kundu hugsað sær lægri elprís. Men lægri elprísur til onkran, merkir hægri prís til onkran annan.

At veita hitapumpum serprís má roknast sum óbeinleiðis studningur, goldin av húsarhaldum og vinnulívi v.m. umvegis SEV-kassan. Rættast er helst, at studningur til slík tiltøk heldur eigur at vera beinleiðis og gjøgnumskygdur, t.d. umvegis landskassan.

Orkusparing ger SEV nakað (umenn kanska ikki nóg mikið) við.

SEV hevur fólk burturav til at ráðgeva og undirvísa í skilagóðari elnýtslu, og verða umleið ein hálv millión kr. brúktar til hetta um árið. M.a. hava allir 9. floks skúlanæmingar í landinum í fleiri ár verið hjá SEV til ein "temadag" um orkunýtslu.

Sostatt hava fleiri árgangir av ungdómum í Føroyum higartil fingið frálæru um skilagóða orkunýtslu.

Viðvíkjandi viðmerkingunum til demokratisku skipanina hjá SEV, kann verða víst til, at tað eru fólkavaldu umboðini fyri allar kommunurnar í Føroyum – og harvið óbeinleiðis alt Føroya fólk – sum útnevna umboðsnevndina hjá SEV, sum síðani velur stýrið.

Stórt meira demokratiskt kann tað neyvan gerast, og er henda viðmerking tín sostatt í andsøgn til hugskot títt um privatisering.

Í grein tíni nevnir tú tvey tøl, sum bæði eru skeiv.

Tú sigur, at SEV avskrivar vatnorkuíløgur yvir 6 ár. Veruleikin er, at SEV avskrivar vatnorkuíløgur yvir 20 ár, svarandi nøkulunda til avdráttartíðina av teimum lánum, ið hava fíggjað hesar íløgur.

Tú heldur eisini uppá, at hæddarmissurin í Eiðisverkætlanini er 100 m.

Veruleikin er hesin:
Eystantil er sunnasta áin Vesturdalsá. Har er tunnilin í 187 m hædd ella 37,5 m omanfyri hægstu vatnstøðu í Eiðisvatni. Áarinntakið liggur 15 m hægri m.a. orsakað av lendisviðurskiftunum á staðnum.

Fyri vestan er sunnasta áin í "Eiði 2"-ætlanini Sandá við Selatrað. Har verður tunnilin í 205 m hædd ella 55,5 m yvir hægstu vatnstøðu í Eiðisvatni. Sjálvt áarinntakið verður helst einar 10 til 15 m hægri.

Neyðugt er við einum ávísum halli í samlitunlinum fyri at vatnið skal renna, men sum tú sært, er hallið langt frá tí, ið tú rør framundir. Meðal hæddarmissurin yvir allan teinin fyri eystan man vera einar 20 til 25 m og fyri vestan einar 30 til 35 m.

# Listinlærdur er hann Biker-Marjus

HJALMAR N. POULSEN
Vestmanna hin 26. apríl 2006



Háttvirdi løgtingslimur, Marjus Dam, nú kommunulækni upp á hálva tíð, gremur seg í fjølmiðlunum um, at hann ongantíð sleppur fram at mikrofonini, tá árliga flaggdagsrøðan verður hildin, tímur ikki at "standa modell" og so framvegis.

Kann ikki halda mær, men koma við eini lítlari viðmerking til hansara dupultmoralska hugburð.

Sigast má, at hatta var eitt satt egotripp, tí Merkið grætur als ikki og langt frá ti. Heldur er tað Marius sjálvur sum fellir tár – helst krokudillutár.

Sig mær, er nakar munur á at skræða grundlógaruppskotið og so at skræða tjóðareyðkenni okkara? Ella fyri tann skuld, ikki at góðtaka tjóðareykenni okkara? Eftir mínum tykki er í øllum føri talan um persónliga at hava vannvirðing fyri rættarsamfelag okkara og harvið tjóð okkara sum so.

Tjóðareyðkenni okkara, Merkið, fekk sum kunnugt sín uppruna sum okkara elskaða og sermerkta felags stavnhaldsmerki, bæði mentunarliga og tjóðskaparliga, og hevur staðið sum so í mansminnir. Hetta er so sanniliga ikki sambandsmonnum at takka, og slettis ikki Marjusi. Tá ið á stóð á sinni, vildu sambandsmenn als ikki hoyra talan um, tíans heldur góðtaka, at Dannebrog var útskift við Merkið.

Hin afturhaldssinnaði hexadoktarin lærdi seg at spinna gull á minst tveimum rokkum samstundis, úr politiskum og heilsufrøðisligum framleiðslutilfari, so minst tvær flugur fingust við eitt smekk.

Alíkavæl vildi hann ikki akta landsins lógir, fyrr enn átala var givin honum í 12. tíma, geva seg og spæla av við partar av feitu lønarkekkunumin, tí fíggjarligi missurin var ov stórur og neyðin óiva var vís, so privatkapitalurin harvið ikki vaks eftir ynski hansara. Stór skomm!

Men nú styttir hann sær stundir og dittar sær allment at koma fram við sovorðnum møsni. Grundin er helst tann, at frítíðin gevur pláss fyri slíkum, at kommunalu læknareseptir hansara, nú eru hálveraðar í tali so skriviarbeiði gerst lættari. Men hervið er ein ávísur umbiðin "stikkpillari" givin.

Jú listinlærdur er hann, – "Beikermarjus".

# Ættleiðingarfelagið familjudag

FAMLIJUDAGUR

Aftur í ár fer Ættleiðingarfelagið at halda árliga familiudagin. Hesaferð eru tað eysturoyingar, sum fyrireika dagin, og verður hann hildin 20. mai í Barnagarðinum á Mýrunum í Rúnavík. Barnagarðurin er í einum deiligum umhvørvi beint við Toftavatn, og har er nógv at síggja.

Dagurin byrjar kl. 10.00 við morgundrekka og heldur fram til kl. 17.00.

Ymiskt áhugavert verður. M. a. fer Bessi Bjarnason at halda fyrilestur um *Marte Meo* og fyri tey 10 ár og eldri verður drama. Eisini verður aðalfundur, men fyrst og fremst skal dagurin vera ein *familjudagur*, har høvi verður at síggja kenningar og hava eina góða løtu saman.

– Vit vóna, at dagurin verður eins góður og undanfarnu árini, sigur Ættleiðingarfelagið í tíðindaskrivi.


